Røktar- & Umlættingarheimið

Lágargarður

## Fysioterapeutur til eldraøkið

Í samstarvi við Nærverkið og Tórshavnar kommunu, er farið undir verkætlan at samskipa og menna tilboðini til eldri heimabúgvandi borgarar og tey sum búgva á eldrabúðstovnum í Tórshavnar kommunu.

**Lýst verður eftir avloysara fyri**
- Fysioterapeuti frá **1.oktober 2009 til 31.juli 2010** við tilvísing til Lágargarð á lønarbrøki 1,0

Høvuðsuppgávan hjá fysioterapeutinum er, at fremja og varðveita heilsu og fyribyrgja sjúku, til tess at brúkarin longst møguligt kann klára seg sjálvur.

Endamálið við verkætlanini er, at gagnnýta tilfeingið av terapeutum sum arbeiða á røktarheimunum og skipa soleiðis fyri, er flest møguligt eldri borgarar- heimabúgvandi og tey sum búgva á røktarheimi- fáa gagn av venjingartilboðini sum eru í Tórshavnar kommunu.

Hetta við at teir 7 ergo-/fysioterapeutarnir sum eru settir við høvuðsuppgávuni at venja eldri fólk arbeiða í toymi, undirvísa røktarstarvsfólk, vegleiða í nýtslu av hjálpartólum og at skjalfesta árinini av venjingini.

**Førleikar hjá fysioterapeuti:**
- Er útbúgvin fysioterapeutur
- Hevur royndir innan eldraøkið
- Kann tilrættisleggja og fremja venjingarætlanir
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- Kann undirvísa starvsfólki innan arbeiðsrørslur
- Kann vegleiða um hjálpartól

**Vit bjóða tær:**
- Eitt dynamiskt og fleksibult arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum og menningarmøguleikum
- At vera við til at bróta upp úr nýggjum, og soleiðis hava møguleika at seta títt persónliga fingramerki á toymið og avrik tess

**Starvs- og setanarviðurskifti:**
Eftir sáttmála við Fysioterapeutfelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.
Tú kemur at starvast í ergo-/fysioterapiini á Lágargarði, á Tjarnargarði og heima hjá borgarunum

**Meiri fæst at vita um starvið og verkætlanina við at venda sær til:**
Marjun Poulsen, Toymisleiðari tlf. 356795 ella teldupost: marjunp@torshavn.fo

**Umsøkn við avrit av prógvi og viðmælum skulu senast til:**

**Metu av Fløtum**
Leiðari
Lágargarður
Stoffalág 84
Postsmoga 1188
F0-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 21. september 2009**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## DAGRØKTARA TIL DAGRØKTARSKIPANINA Í HVANNASUNDS KOMMUNU

Søkt verður eftir dagrøktara til dagrøktarskipanina í Hvannasunds Kommunu í farloyvisstarv, at byrja 1. oktober 2009 – 31. August 2010

**Tann ið sett/settur verður skal:**
- Hava góðar umstøður at hava børn, bæði inni og úti.
- Taka ábyrgd og kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísa virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Verða álítandi og hava góð samstarvsevnir.
- Verða tolin og duga at vísa/geva umsorgan.
- Megna at geva børnunum ein mennandi og áhugaverdan gerandisdag.

**Vit bjóða tær:**
- Eitt sjálvstøðugt arbeiði.
- Eitt áhugavert og lívsjáttandi starv, har tú í stóran mun tilrættarleggur arbeiðsdagin.
- Arbeiði í egnum heimið.
- Góðar starvsfelagar.
- Eina spælistovu 2-3 ferð um vikuna saman við børnum og starvsfelagum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið er Hvannasunds Kommuna.
Tann, ið sett verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

**Umsóknin** skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 17 september 2009 kl 12:00, við møguligum prógvum og viðmælum.
Setanarsamrøður verða 18. september
Umsóknin skal sendast til:

**HVANNASUNDS KOMMUNA**
Sundsvegur 31
740 Hvannasund
Ella t- post: hvannasund@hvannasund.fo

## Lutaíbúð á 53 m² til sølu í Keypmannahavn

Íbúðin er umvæld í 2004 og er í góðum standi. Stórur grønur bakgarður, sum er nýumvældur í 2008. Liggur nær handlum, ítróttartilboðum og náttúru. Stutt inn til sentrum og gott buss- og toksamband.

Innskotið liggur á 650.000 kr (upprunaliga uml. 940.000) og húsaleigan 2.798 + fastar útreiðslur (uml. 500 kr.)

**Sí meira á www.hulgaardsvej124.blogspot.com.**

*ZARTEC.NET · tlf. 226459*
*Zartecbygging@hotmail.com*

*Lat okkum hoyra frá tykkum og fá eitt gott tilboð.*

ZARTEC
BYGGING

# Nýtt teoriskeið

**Nýtt teoriskeið byrjar týsdagin 8. sept. kl. 17**

***– avgreitt skjótt og gott!***

**Tilmelding fram á:**
**211099 Stanley A. Olsen**
**223041 Niels Petur Olsen**

**KOYRISKÚLI FØROYA**
Stanley A. Olsen tel. 211099
Niels Petur Olsen tel. 223041
Brekkugøta 8 · 100 Tórshavn

## FØROYA SKIPASKRÁSETING

**Vegna flyting er stongt**
mánadagin 7. og týsdagin 8. sept.

Meðan stongt er, kunnu skjøl latast inn á Skráseting Føroya í Sigmundargøtu 13, 1. hædd.

Mikudagin 9. sept.kl. 9:00, lata vit uppaftur í nýggjum hølum í Sigmundargøtu 13, 2. hædd

FAS
**Føroya Skipaskráseting og Føroya Altjóða Skipaskráseting**
**Tlf 35 15 00**



## Stór hús á 465 m² til Sølu, í Skálafirði

Húsini eru í 3 hæddum.
1 hædd er 185 m², og hevur køk, stovu, 5 kømur, 2 wc við brúsu og vaskirúm.
2 hædd er 175 m², og hevur køk, stovu, 4 kømur, goymslurúm og 2 wc við 4 brúsum.
3 hædd er 85 m², og hevur 3 kømur.
Fyrsta og onnur hædd hava egnað inngongd.
Sera góð parkeringsviðurskiftið rundan um húsini.
Grundøkið er 936m².

Partur av húsinum er útleigað í løtuni, og áhugi er til staðar, hjá fyritøkum, ítróttarfeløgum og øðrum at leiga restina. Bed&Breakfast er eisini ein møguleiki.
Húsini eru eisini sera væl egnaði hjá stórari familju, sum so hevur møguleikan at leiga 1 ella 2 hædd út til onnur at búgva í.
Fígging kann møguliga fylgja við í keypinum.
Einans seriøsir fyrispurningar.

**Send teldupost til Leif@fofish.com um nærri kunning, ella ring 219288 millum kl. 16.00-20.00**